gult2 cyan2 magenta2 svart2



# Ungfólk konsert á Giljanesi



*Hetta eru tey tólv ungu fólkini saman við leiðarum, sum fara at spæla á Giljanesi hóskvøldið kl. 20.*

Hóskvøldið 28. juni kl 19 fer Coll'Arco at hava konsert á Giljanesi. Coll'Arco er ein 12 manna bólkur úr Norrkøping í Svøríki. Hetta eru alt ungfólk millum 12 og 17 ár, sum gera nógv fyri at gerast góðir fiólspælarar. Tey hava øll verið í musikkskúlanum, síðan tey vóru 4 – 5 ára gomul. Tey eru upplærd eftir Suzuki háttinum.

Leiðari hjá hesum ungu tónleikarunum er Päivikki Wirkkala-Malmqvist, sum hevur sína útbúgving frá Sibeliusacademin í Helsingfors.

Coll'Arco hevur tey seinastu 4 árini ferðast víða um við tónleiki sínum bæði í Svøríki, Noregi, Danmark, Finnlandi, Lettlandi, Frankaríki, og Polen. Hesaferð gongur so leiðin til Føroya.

Norrkøping er vinarbýur hjá Klaksvíkini, og tey fara sjálvsagt eisini at vitja har, men tey eru samstundis serliga innboðin at umboða Svøríki á NMPU ráðstevnuni, sum í ár verður í Føroyum. NMPU er felagskapurin av musikkskúlunum í Norðurlondum.

Við á ferðini er eisini Bjørn Sunnerstam, sum var tónleikalærari í Havn í nøkur ár í 1980unum. Hann er sera hugtikin av Føroyum og føroyingum og talar føroyska málið ræðið. Ein dóttir hansara er við í bólkinum, og hann gleðir seg til at vísa føroyingum, at musikkskúlin eisini hevur framgongd í Svøríki eins og í Føroyum. Hann vónar sjálvsagt at síggja so mong sum møguligt til konsertirnar.



# Framsýning við skreytknívum

TÍÐINDASKRIV

*Føroya Fornminnissavn*

Í summar fer Føroya Fornminnissavn at sýna fram eitt sjáldsamt savn av føroyskum grindaknívum, sum teir flestu eru læntir frá knívasavnara í Danmark. Meginparturin av savninum stavar úr savni, sum danski gullsmiðurin Holger Jacobsen savnaði fyri fyrra veraldarbardaga.

Knívarnir, sum teir flestu eru skreytknívar, umboða bæði fornt føroyskt knívasmíð og tað serliga fína listhandverkið, sum mentist í aðru helvt av 19. øld og fyrst í 20. øld. Stílførdu myndevnini, sum eru innløgd í skeftini á mongum av knívunum, eru síðani vorðin tjóðskaparligar ímyndir í Føroyum, serliga grindareiðskapurin og báturin.



*Nakrir av sjáldsomu føroysku grindakvívunum, sum verða sýndir fram á Fornminnissavninum*

Knívaframsýningin letur upp hósmorgunin tann 28. juni kl. 10. Savnið verður sýnt fram í framsýningarhølum fornminnissavnsins í Brekkutúni fram til seinast í august.

Í sambandi við upplatingina av framsýningini kemur eisini eigarin av knívasavninum og ein kendur danskur knívasmiður á vitjan. Knívasavnarin, sum eisini er granskari, hevur í mong ár havt áhuga í norðurlendskum knívasmíði og skrivað fleiri vísindaligar greinar um evnið. Teir vilja fegnir hitta fólk, sum hava áhuga fyri ella kunnleika til føroyskt knívasmíð.




Manaña bilas caputo
con Trygd no problemas

Út at ferðast við bili í summar?

TRYGD Bilhjálp

Tað er ikki altíð so stuttligt at standa uppsteðgaður uttanlands. Hvar fái eg hjálp, hvat kostar tað, og dugi eg at siga tað...?

Við **Trygd Bilhjálp** er "no problemas" - ring, og vit koma við hjálp.

**Trygd Bilhjálp** er eitt ískoyti til skrokktryggingina og fevnir m.a. um útreiðslur til starthjálp, veghjálp, kranabil og mekaniska hjálp á staðnum í sambandi við óhapp, motorsteðg ella líknandi.

Við **Trygd Bilhjálp** fært tú ókeypis hjálp nærum um alt Europa, tí Trygd samstarvar við Falck í Danmark.

Er títt tørn komið til at verða óheppin, skalt tú bert ringja til Falck, og tú fært hjálp.

**Trygd Bilhjálp** kostar einans 350,- kr. um árið, tá ið bilurin er yngri enn 6 ár, og 450,- kr. um árið, er hann eldri.

Um tú ikki longu hevur tryggjað bil tín hjá Trygd, so eru nú enn fleiri orsøkir til at gera tað.

Kom inn í eina av deildunum hjá Føroya Banka ella til Trygd og fá tær **Trygd Bilhjálp** - tað fer at loysa seg.

*...tí Trygd Bilhjálp fevnir eisini um Europa*

TRYGD

Gongin 7 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11

pétur & pétur • 320870


gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Tróndur skal sýna fram í París og Kastrup

**Størsta avbjóðingin á yrkisleiðini hjá Tróndi Paturssyni stendur fyri framman. Um eitt ár skal hann luttaka á eini framsýning á Triumfboganum í París, og harumframt fær hann væntandi pláss á flogvøllinum í Kastrup**



*Fuglarnir hjá Tróndi Paturssyni fáa óivað fast pláss á flogvøllinum í Kastrup*

LIST

*Stefan í Skorini*

Listamaðurin Tróndur Patursson úr Kirkjubø stendur fyri tí størstu avbjóðingini nakrantíð í hansara lívi sum listamaður.

Hann hevur fingið innbjóðing til eina stóra listaframsýning í franska høvuðsstaðnum París. Framsýningin verður á tí kenda Triumfboganum miðskeiðis í París. Har hevur Tróndur fingið pláss á takinum á boganum, har hann hevur 400 fermetrar at bólta sær á. Listaverkið hjá Tróndi fer at standa undir opnum himli.

Væntandi fara eini 400.000 fólk at vitja framsýningina, sum verður í juni, juli og august í næsta ár.

Hóast long tíð er til framsýningina, so er Tróndur farin undir fyrireikingarnar til listaverkið, og byrjað verður væntandi einaferð í heyst. Hann sigur, at tað verður eitt listaverk við speglum og glasi, og ætlanin er, at hetta skal vera ein stór uppliving av dimensjónum.

Um ein persónur fer inn í rúmið við speglum, eru 6000 spegilsmyndir av sama persóni.

Trupulleikin er at fáa figging til verkið. Summir grunnar seta ta treyt, at listaverkið skal vera selt og hava fingið eitt fast pláss onkustaðni, áðrenn teir lata stuðul. Listaverkið er ikki selt enn, og tí kann vera trupult at fáa figging.

Tróndur sigur tó, at um listaverkið ikki verður selt frammanundan, so er góður møguleiki fyri at selja tað á sjálvari framsýningini í París.

– Hetta er tann størsta og mest spennandi uppgávan hjá mær nakrantíð, og tí má hesin møguleikin ikki fara framvið borðinum, sigur Tróndur Patursson, sum vísir á, at fleiri aljtóða viðurkend listafólk vera við á framsýningini.

## Fuglar í Kastrup

Á flogvøllinum í Kastrup í Keypmannahavn hanga í løtuni fimm glasfuglar, sum Tróndur hevur latið úr hondum. Enn hevur Tróndur ikki fingið endaliga at vita, um listaverkið skal hanga fast á flogvøllinum, tí tann stóra nevndin, sum skal taka endaligu avgerðin, hevur ilt við at taka støðu.

Tróndur hevur fingið pláss í C2 deildini á flogvøllinum, har eitt stórt vindeyga, sum er 20 ferðir 7 metrar til víddar, har sett av til hansara. Verður avgerð tikin um, at listaverkið hjá Tróndi skal upp at hanga, so verða einir tjúgu glasfuglar, hvørs veingjaspenni er hálvantriðja metur, hongdir upp í Kastrup.

Henda verkætlanin hevur verið í gongd í eini trý ár, og tí vónar Tróndur at fáa endalig boð skjótt, og hann vónar sjálvsagt, at hansara listaverk fær pláss á flogvøllinum, har fleiri túsund fólk ferðast hvønn dag.



*Tróndur sigur seg hava sína mest spennandi uppgávu fyri framman, tá hann skal hava framsýning í París*

# Steuerwald fingið loyvi

GENGRANSKING

*Stefan í Skorini*

Vísindasiðseminevndin hevur givið týska barnalæknanum Ulrike Steuerwald loyvi at fara undir gengransking í Føroyum.

Nevndin hevur á fundi 11. juni 2001 viðgjørt umsóknina frá Ulrike Steuerwald, sum er dagfest 19. apríl í ár, um loyvi til granskingarætlan. Endamálið er at finna møguligt genetiskt brek í orkuverkinum í kyknunum (mitokondriunum) hjá børnum.

Nevndin hevur samtykt at ganga umsóknini á møti eftir at hava fingið neyðugu upplýsingarnar í málinum.

Av tí at lóg um gengransking í Føroyum er í umbúna, hevur nevndin gjørt Almanna- og Heilsumálastýrinum vart við góðkenningina.

# Bara eitt harðskapsmál á Jóansøku

LØGREGLUTÍÐINDI

*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Suðuroynni sigur frá eini sera friðarligari stevnu, nú Jóansøkan júst hevur verið. Bara eitt harðskapsmál er uppskrivað. Talan var um ein mann, ið hevði skallað ein annan við kirkjuna á Tvøroyri. Tann álopni breyt eina framtonn. Løgreglan veit enn ikki fyri vist, hvør gerningsmaðurin er.

Løgreglan gjørdi eisini ferðmátingar á Jóansøku.

Nýggi lasarin máldi ferðina hjá rættiliga nógvum bilum í Trongisvági. Fýra frágreiðingar vórðu skrivaðar. Ein førari koyrdi 101 kilometur um tíman í bygdum øki, og hann kann tí vænta sær eina treytaða frádøming av koyrikortinum í øllum førum.